# Loysn í ljósmála um kongafiskin

**– Men hvør hendan loysnin verður, er ov tíðliga at siga nakað um enn, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Jørgen Niclasen væntar nú, at føroyingar og grønlendingar fara at semjast um eina loysn um kongafiskin í Irmingarhavinum.*

Sambært Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fiskivinnumálum, er nú glið komið á spurningin um føroysku kongafiskakvotuna í Irmingarhavinum.

– Í løtuni er líkt til, at ein loysn verður funnin, sum báðir partar kunnu góðtaka. Hvør loysnin verður, er tó ov tíðliga at siga nakað um enn. Í politikki vita vit, at einki er avgjørt, fyrr enn semjan er gjørd.

Fiskimálaráðharrin heldur tó, at ymiskt nú bendir á, at stríðið hjá honum og embætisfólkunum í Tinganesi ikki hevur verið til fánýtis.

– Tá ið eg var í Grønlandi herfyri í øðrum sambandi, steðgaði eg har yviri ein dag longri enn ætlað, og hetta var fyri at tosa við ymiskar partar í Grønlandi um kongafiskaspurningin.

## Royndi øllsínu kynstur

Í Grønlandi hitti Jørgen bæði grønlendska fiskimálaráðharran og landsstýrisformannin.

Men áðrenn Jørgen fór til Grønlands, hevði Hans Enoksen, fiskimálaráðharri, boðað frá, at hann als ikki vildi tosa um kongafiskakvotuna, tí Grønland vildi ikki víkja frá sínari tulking av avtaluni. Jørgen og Hans búðu á sama hotelli, og sum tíðin leið, bar til at koma á tal við Hans um kongafiskin.

– Í Grønlandi royndi eg øll míni kynstur, bæði hendanvegin og handanvegin, at fáa grønlendingar at skilja, at spurningurin um tey 500 tonsini aftrat, bygdu á føroyska og grønlendska veiði í Irmingarhavinum og ikki um samlaðu veiðina hjá øllum tjóðum sum fiska av grønlendskari kvotu.

Jørgen ásannar, at grønlendingar hava verið tungir at tosa við og rættiliga avgjørdir.

– Tað nyttar einki, at vit hava eina tulking av sáttmálanum og grønlendingar eina aðra. Vit mugu finna eina politiska loysn, sum báðir partar kunnu liva við.

Eftir mongu og drúgvu samrøðurnar millum ymisku partarnar, er nú glið komið á, og eg vænti, at okkurt fer at henda rættiliga skjótt, sigur Jørgen Niclasen.

## Minni attraktivt

Í samrøðu við Sosialin í síðstu viku, segði reiðarin á Akrabergi, Anfinn Olsen, at so hvørt, sum tað líður út á heystið, gerst ein møgulig føroysk eykakvota minni attraktiv, tí veðurlagið í Irmingarhavinum er so ringt, tá ið tað líður út.

Í løtuni er Akraberg undir pólskum flaggi og fiskar av pólskari kvotu í Irmingarhavinum.

# Diplomatiska kreppan millum Føroyar og Grønland er loyst

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Beint áðrenn Sosialurin fór til prentingar í gjár, ringdi Jørgen Niclasen, landsstýrismaður og boðaði okkum frá, at diplomatiska kreppan millum Føroyar og Grønland nú er loyst.

Fríggjadagin undirskrivaðu partarnir eina avtalu sum sigur, at Føroyar fáa tey 500 tonsini av kongafiski aftrat í Irmingarhavinum, samstundis sum grønlendsk skip sleppa at fiska 100 tons undir Føroyum, men uttanfyri ringin.

– Hetta gjørdist so úrslitið av tí, eg vil kalla teirri diplomatisku kreppuni, sum hevur verið millum londini bæði síðan hálvan august, sigur Jørgen Niclasen.

Hann metir, at útflutningsvirðið av hesum 500 tonsunum av kongafiski verður einar 4-5 milj. krónur, so avtalan, sum gjørd er, hevur ikki ongan týdning fyri samfelagið.

– Ivasamt er, um grønlendingar fara at gera brúk av síni kvotu undir Føroyum, har landsstýrið hevur treytað sær, at hjáveiðan av toski og hýsu ikki kann fara yvir 20%.

Jørgen sigur, at undir samráðingunum, sum verið hava um loysn av trætuni, er komið fram, at grønlendingar hava áhuga í at sleppa at fiska undir Føroyum.

– Men tað verður so ikki eftir toski og hýsu, tí til tess hava vit nóg mikið av skipum á grunninum, leggur hann dent á.

Landsstýrismaðurin fegnast um, at luftin nú er reinsað aftur millum londini, soleiðis at komast kann víðari.

– Vit mgu bara staðfesta, at avtalan, vit høvdu við Grønland um kongafiskin í Irmingarhavinum, var ikki nóg greið, og tað verður so uppgávan til næstu samráðingar at fáa hesa skorna út í papp, so eingin ivi verður um, hvussu nógv tons føroysk skip kunnu fiska av kongafiski í Irmingarhavinum, sigur Jørgen Niclasen, landsstýrismaður.

# Óvist, hvør fer at fiska av kvotuni



*Landsstýrið fer nú at taka støðu til, hvussu tey 400 tonsini, sum Føroyar eiga aftrat í Irmingarhavinum, skulu fiskast.*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Nú trætan millum Føroyar og Grønland um kongafiskin í Irmingarhavinum er loyst, er óvist, hvør fer at fiska av eykakvotuni, sum Føroyar hava fingið.

Talan kann vera um trý skip; Akraberg, Ljósafelli og Enniberg.

Í løtuni fiskar Akraberg undir pólskum flaggi og av pólskari kvotu, meðan Ljósafelli, sum eisini er í Irmingarhavinum, fiskar sambært veiðiavtalu av kvotu hjá grønlendskum reiðaríi. Enniberg hevur júst verið í Bretlandi og selt, og tað er ikki óhugsandi, at teir kanska eisini hava áhuga í hesi kvotu.

## Landsstýrið tekur støðu

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur, at landsstýrið fer nú at viðgera, hvør ella hvørjir skulu fiska eykakvotuna.

– Samanlagt eiga vit nú 400 tons eftir av kongafiski í Irmingarhavinum, og eg ivist ikki í, at okkurt av hesum skipum fer eftir teimum.

Landsstýrismaðurin sigur, at onnur skip verða ikki sett inn at fiska hesa kvotu.



# Brimil sleipaði Strauk

**Sunnudagin um middagstíð kom Brimil á Klaksvík við Strauki, sum var staddur eystanfyri Hetland, tá teir fingu maskintrupulleikar fríggjadagin**

*Solby A. Eliasen*

Klaksvík:
Skiparin á Brimli greiðir frá, at fríggjadagin fingu teir boð um at Straukur var uppsteðgaður við maskintrupulleikum eystanfyri Hetland.

– Vit fingu so ein fyrispurning um vit kundu sleipa hann. Vit settu okkum so í samband við reiðaríið og søgdu, at vit kundu fara at veita teimum hjálp. Og vit vóru so hjá Strauki leygardagin á middegi. Tað gekk fínt at seta sleip á og so sleipaðu vit hann inn á Klaksvík, har vit vóru sunnudagin á middegi, greiðir skiparin frá.

Hann sigur, at veðrið var avbera gott og tað gekk skjótt og væl báðar vegir. Tað var ongantíð nakar vandi á ferð.



*Brimil kom á Klaksvík við Strauki sunnudagin. Straukur fekk maskintrupulleikar fríggjadagin, tá hann var staddur eystanfyri Hetland*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

# Fiskikapping í Klaksvík

**Árliga fiskikappingin, sum stuðlafelagið Dragin skipar fyri, var í Klaksvík leygardagin. Tveir bátar endaðu javnir á fyrstaplássinum og so varð drigið lut millum teir. Vinnarar gjørdust Sólarn og Marni Isaksen**

FISKIKAPPING
*Solby A. Eliasen*




*25 bátar vóru við í fiskikappingini leygardagin, og tilsamans fingu teir góð 6.500 pund. Tað verður mett at vera rættiliga gott*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

Klaksvík:
Fischer Johannesen ein av trúføstu Dragastuðlunum sigur, at umstøðurnar til fiskikappingina leygardagin vóru av tí allarbesta.

– Bæði veður og streym viðurskiftini vóru av tí besta, so kappingin eydnaðist avbera væl. Teir 25 bátarnir, sum vóru við í kappingini, fingu nógv, men tað vísti seg, at teir bátarnir, sum høvdu verið norðanfyri fingu meira enn teir, sum hildu seg sunnanfyri, greiðir Fischer frá.

Tilsamans hálvtsjeynda túsund pund komu á land leygardagin, og Fischer sigur, at tað má metast at vera rættiliga gott.

Tá fiskikapping er, verða snøri, snella og tráða vanliga nýtt. Tað er ikki loyvi at nýta línu.

Tað løgna hendi, at tá menn fóru at viga, tá vísti tað seg, at tað vóru tveir bátar, sum høvdu fingið líka nógv. Og tað vóru samstundis teir, sum høvdu fingið mest. Sostatt vóru tveir vinnarar.

Tað vóru Marni og Sólarn Isaksen, sum vóru við bátinum Benjamin og so tveir ungir dreingir, Steynir Andreassen og Bergur Mikladal, sum vóru við bátinum Hemarin. Báðir bátarnir høvdu fingið 217 kilo og lógu sostatt javnir á fyrstaplássinum. Og so bleiv drigið lut millum teir, og teir báðir á Benjamini vunnu.

Men tað kundi havt verðið avgjørt uttan lutakast. Tí annar av dreingjunum umborð á Hemaranum, hevði lagt sær eitt kók til síðis, so um hann ikki hevði gjørt tað, so høvdu teir havt tað meira enn hinir og kunnað farið til hús sum vinnarar av bæði fiskikappingini og kappingini um størsta fiskin. Tí hana vunnu hesir unglingar nevniliga. Teir høvdu ein tosk, sum var 93 sentimetrar til støddar. Og fingu teir steyp fyri tað, meðan Sólarn og Marni vunnu steypið fyri sjálva fiskikappingina.

Tá steypini vóru handað, varð skipað fyri uppboðssølu. Men ikki allur fiskurin bleiv seldur har, so restin fór á Fiskamarknaðin, har tað varð selt mánamorgunin.

Fischer Johannsen sigur, at flest allir luttakararnir vóru samdir um, at tað var nógvur fiskur at fáa. Tað kundi farast avstað klokkan átta leygarmorgunin og klokkan fimm seinnapartin skuldu allir bátarnir verða komnir innaftur.

Leygarkvøldið varð so skipað fyri almennum dansi, har Lagamenn spældu. Umleið 250 fólk vóru í dansi, og Fischer sigur, at tað er tað mesta nakrantíð, síðani stuðulssfelagið Dragin fór undir at skipa fyri fiskikappingini í 1991. Árini frammanundan var tað Lions Club, sum skipaði fyri.

– So alt í alt má sigast, at tiltakið eydnaðist avbera væl í ár, sigur hann.

## Gott fíggjarligt íkast

Fischer Johannesen sigur, at tað bleiv selt fyri úti við 10.000 krónur leygardagin, men hann hevði ikki tey neyvu tølini, tá Sosialurin tosaði við hann, tí restin var ikki seld tá á Fiskamarknaðinum.

Men hann dylir ikki fyri, at hetta tiltakið sum tað er, er eitt avbera gott fíggjarligt íkast til stuðulsgrunnin hjá Draganum.

– Tað er ikki á hvørjum degi, at grunnurin fær yvir 50.000 krónur í kassan. Vit hava sum sagt ikki gjørt endaligu støðuna upp enn, men tað er heilt vist, at talan er um meira enn 50.000 krónur, sigur ein sera vælnøgdur Fischer Johannesen.

Peningurin, sum kom inn frá tiltakinum, fer beinleiðis í stuðulsgrunnin hjá Draganum. Arbeiðið at gera Dragan líður nú sera væl.

– Ja, ja, nú lýsa ljósini niðri undir, so nú slepst frá at fara á WC við lummalykt, sigur ein vælhýrdur Fischer skemtandi.

Hann sigur, at teir vænta, at Dragin fer at sigla komandi summar.

Framhaldsdeildin í fólkaskúlanum hevur sjóvinnu til vallærugrein, og Fischer sigur, at salongin umborðu er innrættað til eina skúlastovu, har tað so er møguligt at hava undirvísing. Eisini plagar sjóvinnuflokkurin í Sjómansskúlanum at vera umborð onkuntíð.

GÓÐIR BRÚKTIR BILAR

**Nissan Micra**
reyður, 5 hurðar,
15.000

**Nissan Terrano** II 2,7DT Van
grønur, 4 hurðar,
árg. 1996.

**Nissan Primera 2,0 SLX**
hvítur, 4 hurðar,
árg. 1997, 45.000 km.
105.000

**Peugeot 306 DT 1,9**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1997, 150.000 km.
90.000

**Peugeot 406 ST 2,1 DT**
beige, 4 hurðar,
árg. 1997, 136.000 km.
143.000

**Opel Astra 1,4 GL**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1992, 134.000 km.
42.000

**Opel Astra 1,6**
5 hurðar,
árg. 1998.
92.000

**Opel Astra 1,6 St. Car**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1993, 116.000 km.
55.000

**Opel Astra 1,7 DT**
brúnur, 4 hurðar,
árg. 1996.
78.000

**Opel Astra 1,6**
beige, 4 hurðar,
árg. 1997.
78.000

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 60.000 km.
67.000

**Opel Astra 1,6 16V**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1999, 30.000 km.
125.000

**Opel Astra 1,7 DT**
vínreyður, 5 hurðar,
árg. 1997, 101.000 km.
89.000

**Opel Astra 1,6**
bláur, 5 hurðar,
árg. 1995, 109.000 km.
67.000

**Opel Astra 1,7 DT**
beige, 5 hurðar,
árg. 1996, 95.000 km.
85.000

**Opel Vectra 1,8**
svartur, 4 hurðar,
árg. 2000, 22.000 km.
174.000

**Opel Vectra 2,0 Di**
bláur, 4 hurðar,
árg. 1998, 96.000 km.
130.000

**Audi 100**
grønur, 4 hurðar,
árg. 1987, 290.000 km.
25.000

**Fiat Marea**
svartur, 4 hurðar,
árg. 1996, 70.000 km.
85.000

**Ford Courier 1,8d** Diesel Van
reyður, 3 hurðar,
árg. 1995.
28.000

**Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir**
Bilarnir finnast eisini á:
**www.nissan.fo**

P/F Meinhardt Arge
v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171
110 Tórshavn • Tel. 31 61 61

Sosialurin